## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Strúkur í vindi av vestri, sum út á dagin minkar niður í gul til stívt andøvsgul. Skýggjað við regni og ælaveðri. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri, sum dagurin líður landnyrðingur. Skýggjað og møguliga regn av og á. Hitin um 6 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og eystri. Skýggjað og regn í skiftum. Hitin um 6 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Hvassur vindur av landsynningi. Skýggjað og regn. Seinast í tíðarskeiðinum minkar hann vindin og slítur í og hitin økist nakað.

80 eykasíður til jóla:

# Risastór sjónvarps- og jólabløð

BLØÐ
*Jan Müller*




Bløðini Sosialurin kemur út við fríggjadagin og leygardagin eru nakað heilt fyri seg. Inni í vanligu bløðunum liggja tveir tungvektarar av eykabløðum, sum eru sera gott tilfar hjá øllum Føroya fólki alla jólahalguna og heilt fram til nýggja árið.

Í blaðnum fríggjadagin er 40 síður stóra eykablaðið VARPIÐ við hópi av sjónvarps- og útvarpsskráum fyri jólini og fram til nýggja árið.

Í blaðnum leygardagin, sum er tað seinasta fyri jól, er 40 síðu stórt eykablað, JÓLABLAÐIÐ.

Har er nógv og fjølbroytt tilfar. Samrøða er við sjey av veteranunum í Svimjihøllini í Havn. Undir heitinum »Nakni sannleikin« setir blaðmaðurin Justinus Eidesgaard teimum stevnu í hitarúminum. Har er samrøða við Simonu Bjarnaskor av Viðareiði, einkjan eftir Poul Eyðfinn, sum fórst umborð á línubátinum Ágot. Samrøða er við Birgit Kleis, ríkisumboðsmann og mann hennara Brian Grunemann, nú tey fyri fyrstu ferð halda jól í Føroyum. Samrøða er við Otto, sum fann brosjuna hjá prinsessuni. Okkara maður í Rom skrivar um italsk jól. Vitjað verður í urtagarði í Havn, har listamaður hevur gjørt eina trappu og garð úr føroyskum gróti, sum er einki minni enn eitt listaverk - Gróthørð List. Prát er við listamannin Arnold Vegghamar um hansara list. »Vit ynskja bara frið« er heitið á samrøðu við Zeljka og Milan Konzar, sum hava verið flóttafólk í 10 ár. Nú búgva tey í Føroyum. Samrøða er við Sverra Steinhólm, sjúkrahús- og fongsulsprest undir heitinum »Við sjúkrasong og handan læstar dyr«. Hetta eru bert ein lítil partur av tí nógva tilfarinum í jólablaðnum.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷12 |
| Nuuk | ÷7 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | ÷5 |
| Saint John's | 1 |
| Halifax | 0 |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 3 |
| Lerwick | 3 |
| Aberdeen | 3 |
| London | 6 |
| Tromsø | 1 |
| Bergen | ÷2 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 0 |
| Helsinki | ÷8 |
| Moskva | ÷13 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | ÷8 |
| Kiev | ÷10 |
| Bukarest | ÷2 |
| Paris | 7 |
| Madrid | 7 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 12 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 17 |
| Beijing | ÷1 |
| New Dehli | 23 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 35 |
| Sydney | – |
| New York | 3 |
| Miami | 14 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 30 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt hátrýst yvir Bretsku oyggjunum fer í ein landsynning, og eitt lágtrýst í Grønlandsfjørðin fer norður um Ísland til Norður-Noregs




Seinni tekur eitt nýtt lágtrýst seg upp í Grønlandsfjørðinum og brúgvaløg haðani koma inn yvir Føroyar sunnudagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 17/12 kl. 06⁰⁰– 18/12 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,0°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,4 mm – mált frá 17/12 kl. 06⁰⁰– 18/12 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í desember: 52,5 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

14. des.: Mánin longst frá jørðini
19. des.: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 19. des. | 06.03 | 18.25 | 05.03 | 17.25 | 05.18 | 17.40 | 08.03 | 20.25 | 09.03 | 21.25 | 04.18 | 16.40 | 03.18 | 15.40 | 06.18 | 18.40 | 07.18 | 19.40 | 05.48 | 18.10 | 07.03 | 19.25 |
| 20. des. | 06.48 | 19.12 | 05.48 | 18.12 | 06.03 | 18.27 | 08.48 | 21.12 | 09.48 | 22.12 | 05.03 | 17.27 | 04.03 | 16.27 | 07.03 | 19.27 | 08.03 | 20.27 | 06.33 | 18.57 | 07.48 | 20.12 |
| 21. des. | 07.37 | 20.02 | 06.37 | 19.02 | 06.52 | 19.17 | 09.37 | 22.02 | 10.37 | 23.02 | 05.52 | 18.17 | 04.52 | 17.17 | 07.52 | 20.17 | 08.52 | 21.17 | 07.22 | 19.47 | 08.37 | 21.02 |
| 22. des. | 08.28 | 20.53 | 07.28 | 19.53 | 07.43 | 20.08 | 10.28 | 22.53 | 11.28 | 23.53 | 06.43 | 19.08 | 05.43 | 18.08 | 08.43 | 21.08 | 09.43 | 22.08 | 08.13 | 20.38 | 09.28 | 21.53 |


















5 707265 100043 >